# Seinasta freist at melda seg til Ung í Norden 2006

**Seinasta freist at melda seg til sum luttakara á mentanarráðstevnuni Ung í Norden 2006 er nú leygardagin. 20 føroyingar sleppa at luttaka**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í døgunum 28. juni til 2. juli verður risa ungdómsmentunarstevnan Ung i Norden 2006 í Havn. Fyrireikingar hava verið í gongd í meira enn eitt ár, men nú nærkast mentunarstevnan við risafetum. Freistin at tekna seg er 1. apríl – nú leygardagin. Tjúgu ungir føroyingar sleppa at luttaka á stevnuni.

Ung i Norden 2006 verður hildin á Frælsinum í Havn og í Norðurlandahúsinum og tá koma eini 200 ung úr øllum norðurlondum til Føroya í eina viku at vísa fram, læra og skapa nýggja list í felag. Hetta undir leiðslu av fleiri av okkara bestu listafólkum.

### Verksmiðjurnar

Tá luttakararnir eru valdir, verður beinanvegin farið í gongd við at fyrireika sýningar av ungari føroyskari list og mentan. Tilmeldingar kunnu latast Føroya Ungdómsráð ella Meginfelag áhugaleikara Føroya, sum velja luttakararnar og seta bólkaleiðarar.

Nú allar tær praktisku fyrireikingarnar eru við at koma uppá pláss, kunna vit eisini avdúka flestu verksmiðjurnar. Verksmiðjurnar verða býttar í tríggjar bólkar.

Vár Berghamar Jacobsen samskipar verksmiðjur við Inga Joensen frá Grafikstudio,

Kára Jacobsen, sangskrivara og framleiðara, Kristinu Hansen, sjónleikara- og filmslistakvinnunum Siggu Vang og Ástu Briem.

Ria Tórgarð samskipar verksmiðjur við Mikkjali Helmsdal, sjónleikara, Katrini Bonde, sjónleikaskræddara, Bernharð Wilkinson, dirigenti, Rannvú Káradóttir og Kristinu Sørensen Ougaard, dansarum í "contemporary dance" og Oggi Lamhauge, grafikara,

Páll Danielsen samskipar verksmiðjur við Hera Joensen úr Týr, Svanhild Strøm, sniðgeva, Guðrið Poulsen og Sámali Blak, sum fara at arbeiða við skortum og livandi skulpturum, donsku Rikke Houd og íslendska Jón Hallur Stefánsson, sum gera frásagnir burtur úr ljóðupptøkum.

Tvær verksmiðjur koma afturat og tær verða kunngjørdar seinni.

Eisini verður ein miðlabólkur, við Rakel Helmsdal sum tíðindaleiðara. Bólkurin verður mannaður við einum umboði úr hvørjum landi. Teirra uppgáva verður at skriva, taka myndir og at halda heimasíðuna hjá stevnuni uppdateraða allar stevnudagarnar.

### Áhugaverd skrá

Á stevnuni verða innanhýsis framførslur og framsýningar hvørt kvøld fyri luttakarum, í Miðlahúsinum verða framførslur fyri almenninginum, og 2. juli verður so ein stórur endabrestur í Norðurlandahúsinum, har allir stevnuluttakararnir sýna fram innan tær listagreinar teir hava arbeitt við. Gist verður sum á legu; í soviposum á skúlagólvi á Sjómansskúlanum í Havn. Men, sjálvandi verður alt gjørt fyri at umstøðurnar verða so góðar sum yvurhøvur til ber.

Stevnudagarnar verður arbeitt í verkstøðum v.m. á Læraraskúlanum á Frælsinum, men til Ung i Norden umskapa Sámal Blak og Heiðrikur á Heygjum skúlan til stevnuøki. Hetta verður gjørt sum kvøldskúlaskeið saman við áhugaðum ungum, sum kunnu melda seg við at ringja til Ung i Norden 2006.

Umsóknarbløð fáast á www.fur.fo" www.fur.fo ella á www.maf.fo . Eisini er meira kunning um Ung i Norden á heimasíðuni www.unginorden.fo





**OPEL ASTRA 1.6 16V**

**Bilurin er frá 1999 og sær rættuliga gott út 4 nýggj dekk á alufelgum fylgja við**

**Til sølu fyri 70.000 kr.**

**nærri fæst at vita við at venda sær til:**

**Sp/f Plátuverkstaðið**
v/Glenn Perdomo
tel 321778 ella 221778


# Góð javnvág í fíggjarstøðuni

**Hóast tosað hevur verið um búskaparliga stagnering, hevur Landskassin eina góða fíggjarstøðu**

LANDSKASSIN
*Jákup Mørk*

Seinasta gjøgnumgongdin av fíggjarstøðuni hjá landskassanum vísir, at nettostøðan er góð.

Soleiðis byrjar Landsbankin seinastu frágreiðing sína, sum er at finna á www.landsbankin.fo.

Víst verður á, at nettoognin hjá landinum í dag er 101 mió kr., sum svarar til 1% av bruttotjóðarúrtøkuni. Fyri tíggju árum síðani var talan um eina nettoskuld, sum svaraði til 75% av BTÚ.

Samstundis er bruttolánaskuldi minkað úr 113% í 35% av BTÚ. Bæði tí skuldin sjálv er minkað, og tí talan eisini hevur verið um ein munandi vøkstur í BTÚ.




*Myndin sýnir nettoskuldina hjá landskassanum í mun til bruttotjóðarúrtøkuna*

Gjaldføra ogn landskassans var í 1996 16% av BTÚ. Hon var mest í 2002, tá hon svaraði til 29% av BTÚ, og er síðan minkað til 17% av BTÚ í 2005. Gjaldføra ognin er neyðug fyri at landið kann rinda skyldur sínar rættstundis og er tí eisini neyðug fyri at tryggja landsins lánføri.


**Krambúðin hjá Verkstaðnum Vón**

**er á tremur við páskalutum.**



Eisini eru batikknappar og grillhandskar aftur at fáa.

**Krambúðin er opin:**
Mánadag - fríggjadag
kl. 8.30 - 15.30
Stongt er í páskavikuni

**Øll eru vælkomin**

**Verkstaðið Vón** · Hóvabrekka 1 - Argir


# Urtagarðskvøld í Gøtu



Nú várið er komið, eru fólk flestu staðni so smátt farin at hugsa um urtagarðarnar. Ofta eru tó ymiskir spurningar, sum stinga seg upp, tá arbeiðið í hesum skal leggjast til rættis, og nakrir av hesum kunnu svarast, tá skipað verður fyri urtagarðskvøldi á Gøtu bókasavni.

Hóskvøldið klokkan 19 fer Michael JAcobæus at hava forvitnisligan fyrilestur um urtagarðin í Føroyum. Fyrireiking, plantuúrval og ikki minst føroyska veðurlagið, sum hvørt kann arga urtagarðsfólkið, eru millum evnini, sum verða viðgjørd.

Í tíðindaskrivinum leggur bókasavnið samstundis dent á, at hópin av bókum finnast um evnið. Í sambandi við fyrilesturin er ein bókaframsýning sett upp, soleiðis at tey vitjandi eisini kunnu nýta høvi til at fáa fatur á viðkomandi lesnaði.

**-mørk**